VINNU SÍÐURNAR

# 2015-ætlanin kan

**- Tað skulu grundleggjandi reformar til, um Føroyar skulu vera millum heimsins fremstu tjóðir í 2015, bæði í vinnulívinum, á arbeiðsmarknaðinum, á útbúgvingarøkinum, í politisku skipanini og í almennu fyrisitingini. Hetta eru greiðu boðini hjá føroysku vinnulívsrisunum í Íslandi, Jákupi Jacobsen, íleggjara, og Niels Stórá, stjóra. Fyri føroysku íleggjararnar í fleiri risafyritøkum kring heimin tykist tað, sum føroyingar mugu á botn, áðrenn teir vakna, og teir mæla báðir føroysku myndugleikunum til umfatandi liberaliseringar og privatiseringar skjótast gjørligt, um Føroyar ikki skulu drukna í einum globaliseraðum heimsbúskapi**

VINNULÍV
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Fáur hevur upplivað so stóra succés sum 43 ára gamli føroyski vinnulívsmaðurin Jákup Jacobsen. Hann hevur gjørt íløgur í alskyns handilsvirksemi kring allan heim, m.a. í donsku risafyritøkuna Jysk Sengetøjslager, og hevur hann tilsamans 1000 fólk í arbeiði í fyritøkum í Kanada, Íslandi, Føroyum og teimum trimum baltisku londunum. Fyri okkum føroyingar eru Skemman og BR Leikur helst bestu dømini um handlar, sum Jákup Jacobsen eigur. 43 ára gamli havnarmaðurin búleikast í Íslandi og er fyri stuttum farin inn á kinesiska marknaðin, har hann keypir og selur "allar vørur, sum kunnu keypast og seljast", sum hann sjálvur tekur til.

Talið av arbeiðsfólki hansara økist við 20-30 prosentum um árið, og komandi fýra árini fer hann hvørt ár at byggja 100.000 fermetrar afturat fyri at fáa pláss til alsamt vaksandi handilsvirksemi.

Fáur - um nakar - føroyskur vinnulívsmaður hevur í sama mun gjørt seg galdandi á altjóða marknaðinum, og sum eigari hevur Jákup Jacobsen ein annan føroying, 43 ára gamla Niels Stórá, sum stjóra á fyritøkum sínum. Við sínum royndum í altjóða vinnulívi hava teir báðir sínar avgjørdu meiningar um framtíðarútlit á føroyska vinnulívsøkinum, samstundis sum teir hava síni sjónarmið um, hvussu føroyski búskapurin skal kunna standa seg í einum globaliseraðum heimsbúskapi.

## Liberaliseringar

- Tað snýr seg fyrst og fremst um, at føroyingar sum skjótast mugu fáa ein breiðari horisont til tað globala, er Jákup skjótur at svara, tá vit í Miðlahúsinum í Vágsbotni hitta hann og samstarvsfelagan Niels Stórá.

Globaliseringin, sum eftirhondini nærmast er vorðið eitt nýtt mótaorð í alskyns útgávum, setir sambært Jákupi grundleggjandi nýggj krøv til ein og hvønn lokalan búskap, sum føroyingar higartil als ikki hava megnað at fyrihalda seg konstruktivt til. Við støði í teimum sjúkueyðkennum og krepputendensum, sum føroyski búskapurin er ávirkaður av, metir Jákup Jacobsen, at tiltøk mugu setast í verk skjótast gjørligt, um Føroyar skulu hava nakran møguleika at fylgja við og fáa part av teimum ágóðum og fyrimunum, sum búskaparliga globaliseringin hevur við sær. Bæði í vinnulívinum, á arbeiðsmarknaðinum, á útbúgvingarøkinum, í valskipanini og í almennu fyrisitingini.

- Á vinnulívsøkinum verða liberaliseringar og privatiseringar ongantíð ov skjótt settar í verk. Tann sannroynd, at føroysku peningastovnarnir, flakavirkini og stóra flogfyritøkan eru almennar fyritøkur, er ein stórur meinbogi, og øll almenn partafeløg skuldu verðið privatiserað. Samstundis mugu skattur og avgjøld lækkast, t.d. við at innføra flatan skatt á 13% fyri øll, sum eisini hevði verið ein nógv einfaldari og lættari umsitingarlig skipan. Samstundis er tað sera átroðkandi at fáa í lag millumtjóða skattasáttmálar við fleiri lond, so útlendskar fyritøkur fáa hug at koma hendavegin. T.d. kundi eg sum privatur íleggjari ikki komið til Føroya, so leingi eg verði kravdur eftir skatti fyri inntøkur í Kanada. Ísland hevur slíkar sáttmálar við nógv fleiri lond og er tí nógv meiri attraktivt fyri íleggjarar. Og til seinast kann eg nevna, at orsakað av alsamt vaksandi globalu kappingini má og skal tað gerast bíligari at framleiða, uttan at tað nýtist at ganga út yvir reallønina hjá arbeiðaranum, sigur Jákup Jacobsen.

Hann metir við øðrum orðum, at spælireglurnar í føroyskum vinnulívi eiga at gerast liðiligari, meiri fleksiblar og meiri kveikjandi fyri bæði føroyskar og útlendskar vinnulívsaktørar. Í hesum høpi hevur Jákup eitt ítøkiligt uppskot um, hvussu gongd kundi komið á stirvna íløguvirksemi. Hann heldur, at um myndugleikarnir samtyktu, at komandi tvey árini kundu fyrstu 25.000 krónurnar av øllum íløguvirksemi verið skattafríar, hevði hetta møguliga aktiverað fleiri føroyingar. Og samstundis kundi eitt fast vinningsbýti verði sett á átta prosent, so fleiri fingu hug at keypa partabrøv.

- Tað snýr seg í stuttum um at aktivera allan tann føroyska peningin, sum liggur deyður í virðisbrøvum uttanlanda, samstundis sum vit mugu fáa bæði útlendskan og føroyskan kapital í størri mun at arbeiða fyri Føroyar. Um hetta skal eydnast, mugu vit liberalisera og privatisera, sigur Jákup Jacobsen. Og til seinast nevnir stóríleggjarin týdningin av einum opnari handilssamstarvi við ES.

- Sum so mangan nevnt áður eru betri handilssáttmálar við ES eisini átroðkandi. Vit mugu í størri mun vera villig til at spæla við í ES-høpi, slær Jákup Jacobsen fast.

## Nýggjur arbeiðsmarknaður

Men undir liðini á sínum



bossi er Niels Stórá eisini skjótur at vísa á trupulleikan við føroyska arbeiðsmarknaðinum og tey mongu verkføll, sum við jøvnum millumbilum stinga seg upp. Og Niels metir, at føroyingar kundu lært nakað av at hugt at sínum íslendsku grannum, sum fyrst í nítiárunum framdu stórar reformar á arbeiðsmarknaðinum.

- Eftir at verkføll í tíð og ótíð forðaðu menningini av